**Semja**

**millum**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**og**

**YTF**

**galdandi fyri tryggingar- og peningastovnsøkið**

Omanfyri nevndu partar eru samdir um at broyta ásetingar í verandi sáttmálum soleiðis:

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

   1. mai 2021 hækkar lønin við 1,47%.

   1. mai 2022 hækkar lønin fyrst við 0,49% roknað av lønini í mars 2021, og við støði í hesum hækkar lønin síðani við 1,25%.

2. Í grein 5, stk. 7 verður lagt afturat verandi orðing: *"Partarnir eftirmeta tryggingarnar til sáttmálasamráðingarnar fyri at tryggja, at hesar eru kappingarførar."*

3. Samlagstrygging/bólkatrygging í §5 verður dagførd til at fevna um hoyritól og dekningurin við deyða verður 800.000 kr. uttan lækking.

4. Orðið "starvsavtala" verður broytt til "sáttmáli".

   - Í § 12, stk. 1 verður "*sáttmálan*" sett inn í staðin fyri "*starvsavtaluna*" í triðja reglubroti.
   - Í § 1, stk. 3 punkt D í 2c Løn og flokkingar tryggingarfeløgini verður "*Viðv. Næmingaútbúgvingini verður víst til § 10 í "Starvsavtala"*" broytt til "*Viðv. næmingaútbúgvingini verður víst til §12 í sáttmálanum*".
   - Í § 1, stk. 3 punkt E í 2c Løn og flokkingar tryggingarfeløgini verður "*sambært § 10 í Starvsavtaluni*" broytt til "*sambært § 12 í sáttmálanum*".

- Í §6, stk. 3 í álitisfólkaskipanini verður ”*sáttmálanum*” sett inn í staðin fyri ”*starvsavtaluni*”.
- Í §9, stk. 3 í álitisfólkaskipanini verður ”*sáttmálanum*” sett inn í staðin fyri ”*Starvsavtaluni*”, og eitt komma verður ræ ttað.

5. Grein 17 verður orðað soleiðis: “Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. mai 2021. Sáttmálin kann sigast upp við 4 mánaða fráboðan at fara úr gildi til ein 1. mai, tó í fyrsta lagi at fara úr gildi 1. mai 2023.”

**Tórshavn, 27. apríl 2021**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Marita Rasmussen, samráðingarleiðari

**Fyri YTF**

Durita Kjærbo, forkvinna